

KÍ tók sær um reiggj

2. deild: Klaksvíkingar vunnu tryggan sigur á B36, og tóku seg harvi› av aftasta plássinum

JÁKUP MØRK

Teir á næstbesta li›num hjá KÍ tóku sær rættiliga um reiggj, tá teir spældu fyrsta dystin eftir summarste›gin. B36, sum liggur í ovaru hálvu av stigatalvuni var á vitjan í Klaksvík, men teir stó›u als ikki mát vi› heimali›i›.

KÍ var klárt betra li›i› í dystinum, og úrsliti› gav eisini ábendingar um, at li›i› kann skora. Í fyrru hálvu vóru møguleikarnir ofta nógvir, men ta› gekk illa at fáa mál og harvi› stig til høldar.

Í fyrra hálvleiki var nógv spæl ímillum brotsteigarnar bá›ar. KÍ-málverjin hev›i líti› at gera, me›an René Tórgar› í B36-málinum fleiri fer›ir mátti gera gó›ar bjargingar.

Men einu fer›ina klára›i hann ikki at standa í vegin. Ta› var eftir eina stø›u í brotsteiginum, tá B36-spælararnir ikki fingu bóltin burtur. Bólturin enda›i hjá Símuni Joensen, sum beint uttan fyri brotsteigin, smekka› til og í máli› til 1-0.

Innskifti skora›i tvær fer›ir

Hetta var eisini hálvleiksstø›an, men í seinna hálvleiki økti KÍ tvær fer›ir. KÍ-li›i› spældi stundum gott og uppfinnsamt álopsspæl, har Tomislav Sivic var vi› í nógvum, og har Frí›in Ziskason var sterkur á mi›vøllinum.

John Ryan, sum var á 1. li›i hjá KÍ í fyrru hálvu, men sum ikki hevur vant sí›ani ste›gin, fór til baklinjuna í vinstru, og vi› aftaru stong setti Johannes Færø fótin á bóltin og so var 2-0.

Í hálvleikinum kom Erling Fles í KÍ-álopi›, og hetta loysti seg. Hann økti til 3-0, á›renn B36 gjørdi ein lítlan vørr. Jonny Samuelsen var› spældur leysur, og hann sendi bóltin inn undir KÍ-málverjan, sum kom út ímóti. B36 royndi at tr‡sta, men KÍ-verjan stó› stinn.

Og tá so Erling Fles skora›i til 4-1, eftir at Tomislav Sivic fór til baklinjuna, var avger›in fallin.

KÍ tók seg vi› sigrinum fram um Royn, og er ikki longur á aftasta plássi. Og ver›ur KÍ-spæli› eins gott næstu dysturinar, sum ta› var hesafer›, so fer KÍ uttan iva at spæla seg úr ni›urflytingarvandanum. Men longu næsta vikuskifti› hevur KÍ eina trupla uppgávu, tá teir skulu til Fuglafir›ar at spæla.

Tordu ikki at vinna

1. deild: Vágamenn tóku ikki av, tá teir høvdu møguleikan, og so enda›i alt vi› tryggum sigri til runavíkingarnar

JÁKUP MØRK

NSÍ-FS Vágar 3-1 (1-1)

Einki er at siga til, um vágamenn i›ra›u seg eftir dystin i Runavík sunnudagin. Hóast teir fyrsta partin av dystin høvdu allar møguleikar at gera av vi› heimali›i›, men tá ta› kom til stykkist, stó›u teir eftir vi› ongum.

Útili›i› var nevnliga ta› av li›unum, sum byrja›i so nógv betri sunnudagin. Fitt av vindi var eftir vøllinum, og fyrra hálvleik vóru ta› gestirnir úr Vágoynni, sum høvdu fyrimunin av hesum.

Beint sum dysturin byrja›i royndu teir at tr‡sta bóltin móti NSÍ málinum, og ta› var eisini um reppi›, at hetta kasta›i mál av sær alt fyri eitt.

Teir noyddust tó at bí›a til einir 12 minuttir vóru farnir vi› at leggja seg á odda. Hannus Olsen stó› merkiliga fríur stutt uttan fyri brotsteigin, og vi› einum fløtum skoti sendi hann bóltin heilt úti vi› høgra stólpa til 1-0.

Bæ›i á›renn og aftan á hetta var eisini um reppi› at útili›i› skora›i, men hepni var ikki vi› teimum. Fyrst slapp John Johansen leysur av mi›juni, men seinasta dragingin gjørdist ov long, og bólturin fór út av baklinjuni. Seinni hev›i Birgir Joensen eitt dundurskot, sum tók undirsí›una av tvørtrænum, á›renn bólturin støkk á linjuna og út aftur í spæl. Onkur vildi kanska veri› vi›, at bólturin var inni ta fer›ina, men hvørki dómari ella linjuverji lótu vi› seg koma.

Sleptu takinum

NSÍ hev›i so at siga als ikki veri› vi› í spælinum fyrsta hálva tíman, men so vi› og vi› fóta›u teir sær í nógva mótvindinum. Ta› hjálpti tó eisini væl til hjá heimali›num, at gestirnir tóktust vera nøgdir vi› 1-0 lei›sluna, og tískil løgdu seg longur aftur á vøllin.

Hetta gav nevnliga rúmd til Ian og Abraham á mi›vøllinum, solei›is at bóltevni teirra komu til sjóndar. Fyrstu løtuna høvdu vágamenn annars veri› sera kontantir á mi›juni, og hetta hóva›i so avgjørt ikki teimum bá›um mitt á hjá NSÍ.

Hóast runavíkingar solei›is fingu loyvi at ota seg ni›an á vøllin, so sá leingi út til, at gestirnir høvdu fult tamarhald á stø›uni. Onkuntí› íkomu hálvgum spentar stø›ur, tá bólturin var› spældur inn í brotsteigin hjá FS Vágum, men so at siga hvørja fer› var eitt vágabein fyrst á, solei›is at vandi ikki stó›st av hesum.

Ta› kom tí sum vátur vøttur, tá runavíkingar móti endanum av hálvleikinum fingu javna›. Remigius Mikocionis royndi at lofta einum hornasparki ísta›in fyri at boksa burtur, og úr 11 metra fjarstø›u kundi Christian Høgni Jacobsen banka bóltin í neti›.

Bara NSÍ

At talan var um eitt t‡dningarmiki› mál reint sálarliga er einki at ivast í, og li›ini vóru eisini sum hamskift, tá seinni hálvleikur byrja›i.

Vágamenninir tóktust fullkomuliga at hava mist móti›, og seinastu tr‡ korterini átti NSÍ fult og heilt. Ta› gingu ikki tíggju minuttir, so hev›i Christian Høgni aftur gjørt um seg. Vágamenn snorksvóvu, tá eitt fríspark á mi›jum vølli var› tiki› skundisliga. Eddie var› sendir avsta› í vinstru, og tá Remi ikki megna›i at halda skotinum, var álopsma›urin skjótur á.

Eftir hetta hev›i NSÍ hópin av møguleikum, og í onkrum føri var ilt at skilja, hvussu teir bóru seg at vi› at misn‡ta. Tá klokkan var farin um teir 90 minuttirnar, eydna›ist ta› teimum tó loksins at sláa sigurin fastan, og enn einafer› var Christian Høgni Jacobsen upp á spæl.

Hesu fer› var› hann sendir avsta› í høgru, og tá hann skamt innan fyri brotsteigarmarki› royndi at koma fram vi› verjuleikara, var› hann tikin heldur har›liga. Sjúr›ur Jacobsen var ísakaldur, tá hann royndi seg frá brotssparksblettinum, og nærum sletti bóltin dygst úti vi› vinstra stólpa.

Uppibori›

Sum dysturin lei›, var einki at ivast í, at runavíkingar áttu sigurin uppibornan, og ver›ur rokna› í misn‡ttum møguleikum kundi talan lættliga veri› um stórsigur.

Á›renn ta› kom so langt, áttu gestirnir tó langt sí›ani at hava avgjørt dystin, men solei›is er lagnan ofta, tá talan er um botnli›. Hesum væntar nevnliga ofta ta› sálarligu styrkina, sum krevst, fyri at halda eina lei›slu. Ta› at tora at spæla, uttan at vera bangin um, at hinir bert skulu hava eitt mál fyri at javna.

Hjá einum oddali›i› er ta› øvugta ofta galdandi, solei›is at tey heldur hugsa um at skora enn einafer›, so dysturin ver›ur avgjørdur, men oddali› er FS Vágar so langt ífrá.

NSÍ-FS Vágar 3-1 (1-1)
0-1: Hannus Olsen 9.
1-1: Christian H. Jacobsen 44.
2-1: Christian H. Jacobsen 53.
3-1: Sjúrður Jacobsen 90. (br).

Dómari: Lassin Isaksen

NSÍ:
Rúni Joensen – Kári Hansen, Djóni N. Joensen, Arnfinn Langgaard, Sjúr›ur Jacobsen – Gert Langgaard, Abraham Løkin (fyrr Hansen), Ian Højgaard, Eddie Mikkelsen – Dánjal Hansen, Christian Høgni Jacobsen

FS Vágar:
Remigius Mikocionis - Poul Kjartan Thomsen, Zilvanius Zudis, Albert Ari Thomassen – Tór-Ingar Akselsen, Hannus Olsen, Igoris Kirillovas, Sonni Johansen, Rimvydas Bakus – Birgir Joensen, John Johansen.

Christian Høgni Jacobsen var stóra hetjan. Umframt at skjóta tvey av NSÍ málunum, átti hann eisini brotssparki› til ta› tri›ja

Mynd: Jonhard Hammer

Málrok í Sumba

1. deild: Verjurnar vóru víðopnar, tá GÍ vitjaði í Sumba, og talan kundi verið um nógv fleiri enn tey sjey málini

JÁKUP MØRK

Sumba-GÍ 2-5 (2-4)

Ein skuldi trúð, at tá eitt lið vinnur ein fótbóltsdyst so greitt sum 5-2, so hevur einki verið at tosað um.

Tosaði tú við sumbingar og gøtumenn eftir dystin teirra millum sunnudagin, so tóktust teir tó alt annað enn samdir í hesum.

Talan var nevnliga um ein dyst, har eitt hav av málmøguleikum hjá báðum pørtum vórðu misnýttir, og sum onkur áskoðari málbar seg, so kundi endaliga støðan eins væl verið 10-10.

Sumbingar leiktu við eini uppstilling, sum alt eftir tørvi kann kallast 3-6-2 ella 3-4-3, og hetta tóktist at órógva gestirnar ikki sørt fyrstu minuttirnar. Jan Poulsen og Sasa Tomajek vóru hangandi áleyparar, og sum skilst á lagnum, tóktust gøtumenn ikki at vita, hvønn av hesum teir skuldu taka sær av, tá sumbingar fóru í álop.

Tað gekk heldur ikki long tíð, so hevði Sumba lagt seg á odda við hjálp frá júst hesum báðum. Jan hevði gott pláss, tá hann úr góðari støðu smekkaði til, og tá málverjin bert fekk hálvbjargað, var Sasa fyrstur á, og so var 1-0.

Leiðslan helt sær tó bert fáar minuttir, so hevði Jóan Petur Olsen javnað fyri gøtumenn. Tað skuldi seinni vísa seg, at sumbingar høvdu stórar trupulleikar av deyðbóltum, og tað var júst eftir ein slíkan, at hetta málið. Eitt innkast varð longt inn í brotsteigin, og har kundi Jóan Petur seta bóltin í málið.

Tað eydnaðist tó sumbingum enn einaferð at leggja seg á odda, tá Nebosja Veljkovic, sum nú er komin fyri seg eftir skaða, varð feldur í brotsteiginum. Sumbingar vóru sjálvandi nøgdir um brotssparkið, men teir vildu eisini vera við, at Poul Ennigarð skuldi fingið reyða kortið, men har kom einki úr lummanum hjá dómaranum. Brotssparkinum tók Spasoje Biberdzic sær av, og hann sveik heldur ikki álitið.

Meira deyðbóltar

Sum nevnt omanfyri, so høvdu sumbingar stórar trupulleikar av deyðbóltunum, og GÍ nýtti henda veikleika (ella er tað egin styrki) til bæði at javna og at leggja seg fram um.

Fyrsta var tað Bartal Eliasen, sum var hægstur, tá Súni Olsen sendi fríspark inn fyri, og síðani kom Súni at standa merkiliga leysur mitt fyri, eftir at enn eitt innkast varð longt inn í sumbiar brotsteigin.

Tóktist fyrra málið hjá Súna løgið, so bilti seinna málinum í hvussu so er einki. Súni vann sjálvur bóltin á miðjum vølli, og eftir at hava latið bóltin millum beinini á verjuspælara setti hann beina kós móti málinum, og so var 4-2.

Alt uttan mál

Tey bæði málini hjá Súna fullu beint fyri steðgin, og ein kundi kanska hildið, at sumbingar líka sum fullu í fátt av hesum.

Tað var tó øvugta sum hendi, tí tá sumbingarnir komu út aftur á vøllin, løgdu teir beint í krovið á mótstøðuliðnum.

Málmøguleikar í hópatali spurdust burturúr, men hvat teir so gjørdu, fór bólturin ikki í málið.

Í hinum endanum stóð eisini nógv á, tí sum vera man, so viðførdi álopsleikurin hjá Sumba, at verjuparturin ofta lá eftir á, og tí lá væl fyri hjá gestunum at fara í mótálop.

Hóast møguleikarnir ikki trutu, so kom bert tað eina málið hendan hálvleikin. Hetta hendi eftir eitt av mongu mótálopunum hjá gestunum, har Poul Henning Jacobsen slapp at renna einsamallur móti málverjanum.

Mál skulu til

Sum heild tóktust sumbingar nøgdir um sjálvt spælið í dystinum, men teir ásannaðu samstundis, at úrtøkan hevði verið alt ov lítil.

Tað er nú heldur einki at taka seg aftur í, at mál skulu til, um sumbingar yvirliva enn eina ferð. At møguleikarnir koma, er tó fyrsta fortreytin, og í so máta eru teir komnir hálva leið í bjargingarroyndini. Um tað skal eydnast teimukm at røkka hinari helvtini fáa vit at síggja komandi tveir mánaðirnar ella so.

Sumba-GÍ 2-5 (2-4)
1-0: Sasa Tomajek 7
1-1: Jóan Petur Olsen 10
2-1: Spasoje Biberdzic 18 (br.)
2-2: Bartal Eliasen 20
2-3: Súni Olsen 43
2-4: Súni Olsen 44
2-5: Poul Henning Jacobsen 57

Dómari: Jens Petur Brattalíð (VB)

Sumba:
Eigil Olsen – Bergur Winther, Dánjal Johan Joensen, Mortan úr Hørg – Nikola Biberdzic, Hallur Dam Joensen, Spasojé Biberdzic, Hans Jacob Thomsen – Jan Poulsen, Nebojsa Veljkovic, Sasa Tomajek

GÍ:
Sunnvard Joensen – Poul Ennigarð, Bartal Eliasen, Leivur Hansen – Rúni Justinussen, Pauli Jarnskor, Jóan Pauli Olsen, Súni Olsen, Henning Jarnskor – Hans Pauli Petersen, Óli Hansen

EB/Streymur heldur fast

2. deild: Hvalbingarnir vóru bara 10, tá teir leygardagin royndu seg móti oddaliðinum

JÁKUP MØRK

EB/Streymur-Royn 2-0 (2-0)

Stigatalvan boðaði undan dystinum frá, at stórur munur var á teimum báðum liðunum, sum skuldu royna seg á mølini, og hesin munur øktist, longu áðrenn dysturin byrjaði.

Vóru bara 10

Tað var nevnliga soleiðis, at hvalbingar so at siga ikki fingu mannað lið, tá dysturin skuldi spælast vóru sostatt bert 10 hvalbingar á vøllinum, og hetta gjørdi ikki møtumiklu uppgávuna lættari.

Tað vísti seg tó, at hóast EB/Streymur hevði greiða yvirvág í spælinum úti á vøllinum, so gekst tað teimum meira enn striltið, tá málini skuldu skjótast.

Ikki tí. Møguleikarnir trutu ikki á nakran hátt, men inn vildi bólturin so als ikki.

Sum vera man høvdu hvalbingarnir so avgjørt ikki tað stóra at skula sagt hesa løtuna. Teir royndu í størstan mun at leggja dent á verjupartin, og tá teir so fingu fatur á bóltinum, varð sparkað niðan, í vón um at álopið kundi fáa okkurt burturúr.

Brast fyri nevið

Teir á heimaliðinum tókust sera ónøgdir um, at tað soleiðis sá út til at gerast javnt, tá farast skuldi til hálvleik, men beint undan steðginum fingu teir so hol á.

Halldórur Joensen royndi at fara ígjøgnum hvalbiarverjuna, og úrslitið av roynd hansara varð, at dómarin peikaði á hvíta blettin. Brotssparkið setti Knút Vesturtún trygt í netið, og so kundu teir á heimaliðnum draga andan lættari.

Støðan gjørdist enn betri beint fyri steðgin. Jákup Martin Joensen er nú komin aftur av flatlondum, og hann økti um leiðsluna, soleiðis at støðan var 2-0 í hálvleikinum.

Tað man annars vera ein góður styrkur hjá EB/Streymi, at teir nú aftur hava Jákup Martin í hópinum. Fyrra árið royndi hann seg annars í B36, har hann eisini fekk nakrar dystir á besta liðnum, og í fjør var hann so í Danmark størsta partin av árinum.

Mundu mist

Í seinna hálvleiki gekst tað nøkunlunda soleiðis, sum roknast kuni við. Heimaliðið helt fram við greiðu yvirvágini, og hópin av málmøguleikum spurdust eisini burtur úr. Tað eydnaðist teimumk tó ongantíð at sláa sigurin rættuliga fastan, og móti endanum av dystinum var eisini um reppið, at hetta kostaði teimum stig.

Hvalbingarnir høvdu nevnliga tvær sera naskar royndir seinastu løtuna, men tað einu ferðina bjargaði stongin, og seinnu ferðina fekk málverjin vart fyri, tá ein hvalbingur slapp leysur.

Heimaliðið slapp sostatt við hvøkkinum, og teir halda framvegis fast um oddasessin, har teir eru ájavnir tvørámonnum í stigum.

EB/Streymur-Royn 2-0 (2-0)
1-0: Knút Vesturtún (br.)
2-0: Jákup Martin Joensen